

*Benny Samuelsen tók við sum blaðstjóri e ftir pápabeiggjan Georg*

Men hann kom eisini í ta støðu, at hann máttu velja millum at vera trúgvur móti sambandsflokkinum ella pápanum.

Soleiðis var við landsstýrinum sum sat 1951-58. Tá hendi jú tað, at sambandsflokkurin tók Andrass, sum tó tá var farin úr tinginum, av ræði og fór í samgongu við fólkaflokkinum, fremsta "fíggindan" hjá sambandsflokkinum í nógv ár, ikki minst undir krígnum.

Hesa tíðina var Dimmalætting í andstøðu til landsstýrið. Í Sosialinum stóð í gjár, at Eiler Jacbsen hevði keypt Dimmalætting. Eiler hevur verið valevni hjá fólkaflokkinum. So um nakar vendir sær í grøvini í dag, so kundi tað verið Andrass Samuelsen!

Her kann til stuttleika eisini nevnast, at Georg fekk eina ferð í boði at gerast riddari av Dannebrog. Men hann sýtti at taka ímóti hesum heiðuri. Tann krossur, sum hvør fólkafloksloysingarmaður gekk og breiddi seg við, skuldi í hvussu er ikki á hansara bringu!

Men undir klaksvíksstríðnum fyrst í 1950-unum, tá stuðlaði Dimmalætting landsstýrinum og donsku stjórini móti 95% av klaksvíkingum. Tá var sagt, at klaksvíkingar lósu ikki Dimmalætting hesa tíðina uttan tað var í vøttum!



*Oskar Jensen, hálvur føroyingur og íslendingur, fór í læru á Dimmalætting í 1920. Hann doyði seinasta ár 102 ára gamal*

## Sosialt tilvitaður

Georg kundi tykjast at vera sera konservativur, men hann var sera sosialt tilvitaður. Hann var vist tann fyrsti sum yvirhøvur kom við uppskoti um eina arbeiðsloysisskipan.

Dimmalætting var í Georgsa tíð tað avgjørt mest dominerandi blaðið í Føroyum, og eisini tað einasta, sum líktist einum tíðindablaði. Blaðið kom snøgt sagt í hvørt hús í landinum við einum upplagi upp til 13.000.

Men Georg legði tó dent á, at øll sjónarmið skuldu fáa innivist í blaðnum. Tískil vóru eisini øll lesarabrøv hýst. Tey vóru eisini lisin.

## Bróðursynirnir fylgdu eftir

Men Georg var ikki einsamallur Samuelsen á Dimmalætting. Hann átti trý systkin. Steingrim gjørdist sýslumaður í Fuglafirði eftir pápan. Systirin Margretha giftist ikki. Trygvi var kendur sum sakførari og sambandspolitikkari. Steingrim doyði í góðum árum og Margretha kom at arbeiða á sýsluskrivstovuni

Steingrim og Rakul Malena f. Midjord áttu 12 børn, 2 døtur og 10 synir. Av teimum fóru teir seks at arbeiða á Dimmalætting sum prentarar.

Tað hevur í skemti verið tikið til, at beiggjarnir vórðu sendir til Havna í læru á Dimmalætting beint eftir, teir fyltu 14 ár. Teir møttu til arbeiðis hvønn morgun kl.8, og teir fóru til hús, tá ið teir vóru 67 ár.

Nú er so bert ein av brøðrunum eftir á Dimmalætting og tað er Aage, sum í august hevði arbeitt ikki minni enn 50 ár á Dimmalætting.

Hinir brøðurnir á Dimmalætting vóru Benny, Flemming, Herbert, Torleif og Hugo. Teir sum ikki fóru á Dimmalætting vóru Eilif, Jákup (Jov), Gunnar og Stanley. Systrarnar vóru Vilborg og Randi.



*Georg saman við mammu og systkjum. F.v. Trygvi, mamman Beata, Steingrím, Margretha og Georg*

## Benny gjørdist blaðstjóri

Í 1970 kom Benny at skriva fyri Dimmalætting saman við Georg. Hann hevði ein serligan førleika til hetta arbeiði sum setari. Setarar dugdu ofta væl at at skriva føroyskt, tí ofta máttu teir rætta í tekstinum, so hvørt teir settu, og tí gjørdist málið so gott.

Tað var tí eisini náttúrligt, at Benny gjørdist blaðstjóri á Dimmalætting í 1981, tá ið pápabeiggin Georg legði frá sær. Hetta starv hevði hann fram til 1995, tá ið hann fór frá fyri aldur.

Benny dugdi væl at skriva. Men hann gjørdi sær eisini ómak fyri at eingin feilur var í tekstinum, og børnini minnast, hvussu hann altíð tók sær tíð til at fara aftur umaftur, áðrenn blaðið varð prentað at tryggja sær móti setifeilum.

Flemming var leiðari á prentsmiðjuni í mong ár. Hann var var eisini kendur sum táttayrkjari og sangari. Tað mundi vera hann sum stóð fyri tí fasta Óla Onghamar táttinum, sum var fastur í Dimmalætting í mong ár.

## Herbert fekk eina harða lagnu

Sjálvur kom eg serliga væl at kenna Herbert, sum var giftur við eini grannakonu úr Norðragøtu, Gunnvør á Geilabø.

Tey fingu tveir synir Kenneth og Leif Magni, so grundarlag var rættuliga fyri eina eydnusama tilveru.

Men tey fingu annað at síggja. Fyrst í 80-unum fekk Gunnvør blóðkrabba. Viðgerðin fyri hesa sjúku er alt annað enn løtt. Men Gunnvør hevði lívsviljan, sum skuldi til fyri at hóra undan. Men tað skuldu nógvar ferðir á Ríkissjúkrahúsið og Hotel Tórshavn hjá teimum báðum gjøgnum fleiri ár, áðrenn Gunnvør kom fyri seg aftur. Mitt í viðgerðini doyði Leif Magni av eini vanlukku, og tað kundi illa henda nakað verri enn hetta. Gunnvør var nevniliga so sjúk tá, at hon kundi ikki fara heima at fylgja. Men Gunnvør kom fyri seg, og nú kundu tey bæði síggja fram til eina góða tilveru saman.

Men nøkur ár seinni hendi tað ófatuliga, at nú var tað Herbert, sum fær deyðiliga sjúku. So nú var tað Gunnvør, sum má fara til Danmarkar við Herbert til viðgerðar. Men tað gekk bert eitt ár, so var hansara fjørður rógvin í 1995. Hetta kom at merkja, at tey bæði gjørdust mestsum húsfólk á Hotel Tórshavn í fleiri ár, har tey blivu vird av øllum fyri sínum trúfesti móti hvørjum øðrum.

Í 1991 hendir so tað, at Gunnvør knappliga doyr í besta aldri.

## Eitt tíðarskeið farið

Aftaná Benny Samuelsen hava tað verið skiftandi blaðstjórar av Samuelsenættini og nú seinast við einum uttanfyri ættina.

Men kanska var teirra tíð farin. Upprunaliga uppgávan at verja sambandspolitikk var farin í søguna. Sambandspolitikkur er heldur ikki tað, hann hevur verið. Tað er heldur ikki tann munur á flokkunum, sum tað hevur verið.

Nú skulu øll bløð vera óheft, og tað kann vera ringt at síggja nakra linju hjá teimum ella nakran mun á teirra hugburði. Hetta kann vera ein saknur í mun til tíðina, tá ið ein visti hvat eitt blað stóð fyri, og so kundi støða takast út frá tí.

Men tað er eingin ivi um, at Dimmalætting hevur verið ein týðandi partur av føroyska samleikanum. Hetta hevur ikki minst verið galdandi í Samuelsentíðini, serliga hjá Georg og Benny.

Tí verður tað ikki tað sama aftur.



*Prensmiðjan í Erling Jallsgøtu eldsbrunan í 1944*